# Leggja trýst á fyri at fáa nýggja Smyril skjótari

**– Vit hava fingið at vita, at nýggi Smyril verður liðugur í seinasta lagi 15. oktober, vit fara at gera alt, vit kunnu fyri at fáa hann fyrr, sigur Jógvan við Keldu**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nýggi Smyril verður liðugur í allarseinasta lagi 15. oktober, men tað eru vónir um, at tað verður áðrenn tað. Teir, sum hava eftirlitið við byggingini fyri okkum eru samdir um, at talan er um eitt dygdar skip, sigur Jógvan við Keldu*

Nýggi Smyril verður liðugur í seinasta lagi 15. oktober.

Tað hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jógvan við Keldu, nú fingið at vita frá skipasmiðjuni í Spania, sum smíðar skipið.

Men hann hevur eisini fingið at vita, at hetta er tað allar seinasta, at skipið verður liðugt, og at tað er sannlíkt, at nýggi Smyril kann handast føroyingum eitt sindur fyrr enn tað.

Jógvan við Keldu bað fyrr í ár skipasmiðjuna áseta ein nýggjan dag fyri, nær nýggi Smyril kundi leverast.

Men hann legði sera stóran dent á, at hendan nýggja tíðarætlanin helt.

Tað gjørdi hann av ringum royndum, tí áður hevur skipasmiðjan gjørt fleiri tíðarætlanir fyri, nær nýggi Smyril verður liðugur, men ongi av teimum hevur hildið.

Upprunaliga skuldi nýggi Smyril verða liðugur 12. oktober í fjør. So var dagurin settur til 1. desember og síðani til seinnapartin í apríl.

Men ongar av hesum tíðarætlanum hildu og tað støðuna vildi landsstýrismaðurin ikki koma í einaferð afturat.

Hesuferð kravdi hann tískil at fáa eina tíðarætlan, sum skipasmiðjan var fullvís í, at hon kundi halda.

Útfrá hesum hevur skipasmiðjan nú boðað frá, at nýggi Smyril verður liðugur 15. oktober.

Tað fekk eg at vita á fundi við leiðsluna á skipasmiðjuni í Spania seinnapartin týsdagin, sigur Jógvan við Keldu í telefonini úr Spania.

Á Spaniaferð síni hevði Landsstýrismaðurin eisini fund við framtaksgrunnin, SEPI, sum eigur skipasmiðjuna, sum byggir Smyril og har fekk hann eisini greitt honum frá álvaranum í málinum og at Smyril skuldi av røttum vera liðug í oktober í fjør.

– Men eg gjørdi honum eisini greitt at eg fegnaðist um gongdina í málinum síðani ovasti stjórin í IZAR sjálvur tók byggileiðsluna á seg.

### Fara at skunda undir

Nú er so greitt, at nýggi Smyril meiri enn eitt ár seinkaður.

– Hetta er ikki nøktandi fyri okkum og vit fara at gera, hvat vit kunnu fyri at fáa fatur á skipinum áðrenn tað, sigur Jógvan við Keldu.

Hann sigur, at tað hevur alstóran týdning at fáa skipið áðrenn veturin byrjar av álvara so at manningin fær vant seg við skipið ímeðan veðrið enn er hampiligt.

Landsstýrismaðurin hevur eisini fingið at vita, at tað er ikki ósannlíkt, at nýggi Smyril kann verða liðugur fyri tað tíð.

– Tað er eisini greitt, at vit fara at strongja fyri at royna at fáa nýggja Smyri lidnan áðrenn 15. oktober.

Tað er ein spurningur, sum Jógvan við Keldu nú fer at umrøða saman við landsstýrinum.

– Stjórin á sponsku skipasmiðjuni hevur veitt okkum fulla vissu fyri, at 15. oktober er avgjørt tað seinasta, skipið verður liðugt.

Orsøkirnar til seinkingarnar hava verið, at stórir trupulleikar hava verið á skipasmiðjini. Eitt skifti var vandi fyri at hon læt aftur og tí vóru verkføll í heilum.

### Komið heilt annað skil á

Jógvan á Lakjuni sigur, at tá ið hann yvirtók Strandferðsluna seint seinasta summar frá landsstýrismanninum í vinnumálaráðnum, føldi eg, at vit vóru á einum vegamóti hvat nýggja Smyrli viðvíkti, sigur Jógvan við Keldu.

Skipasmiðjan, sum byggir Smyril, er við í IZAR skipasmiðjusamtakinum, sum tilsamans fevnir um einar 9-10 skipasmiðjur.

– Eg metti, at tað var sera stóran týdning at koma á tal við ovastu leiðsluna fyri alt samtakið, men ta lá ikki fyri hjá stjóranum at hitta meg á fundi fyrrenn í februar í ár.

Jógvan við Keldu sigur, at teir høvdu ein sera góðan fund og hann heldur at eftir hendan fundin kom verulig gongd á málið.

– Avtalan var, at hann skuldi fara aftur til Spania at gera støðuna upp viðvíkjandi nýggja Smyrli og kann eftir, akkurát, hvussu málið lá. Tá ið tað var klárt, skuldi hann boðsenda okkum á fund at gjøgnum ganga alla byggingina og tá skuldi hann eisini koma við eini nýggjari tíðarætlan.

Sjálvur átók hann sær ovastu leiðsluna fyri nýggja Smyrli og fekk sær nýggja byggileiðslu afturat sær.

– Tað tykist sum um at rættilig gongd er komin á arbeiðið síðani hann tók leiðsluna í egnar hendur og seinastu tíðina hava 450 fólk arbeitt umborð á nýggja Smyrli alt samdøgurið, so nú gongur skjótt framá við byggingini.

Tað næsta sum hendir er, at umboð fyri sponsku skipasmiðjuna og landsstýrið seta seg saman at gera eina fíggjarliga uppgerð yvir byggingina fyri at fáa greiði á, at nýggi Smyril skal kosta, tá ið dagbøtur, rentur, seinka byggitíð og alt er tikið við.

Jógvan við Keldu sigur, at hann nú hevur boðið ovasta stjóranum fyri IZAR til Føroyar í summar at geva landsstýrinum eina frágreiðing um støðuna.

– Tað er heilt skilligt, at síðani ovasti stjórin á skipasmiðjuni tók málið í egnar hendur, er heilt annað lag komið á byggimálið og tað kunnu vit ikki annað enn fegnast um.

– Samstundis hava vit gjørt greitt, hvussu stóran dent vit leggja á at dygdin í skipinum er í lagi og tað hava okkara egnu teknikarar, sum hava eftirlit við byggingini, siga, at talan er um eitt dygdarhandverk.

Tað hevur verið frammi, at nógv brek og lýti vóru við nýggja Smyrli tí byggingin var so illa frágingin, men alt tað er rættað nú.

– Í so máta er onki at finnast at longur, sigur Jógvan við Keldu.

# Fingu fulla undirtøku í stríðnum um føðideildina



*Tað er ongin ivi um, hvat limirnir í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar halda um umleggingarnar á føðideildini*

**Á ógvuliga fjølmentum limafundi hjá sjúkrarøktarfrøðingunum var ongin ivi um at nevndin hevur fulla undirtøku**

UMLEGGINGAR Á FØÐIDEILDINI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit hava fingið fulla undirtøku fyri tí, vit hava stríðst fyri í sambandi við ætlaðu umleggingarnar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum.

Tað var greitt eftir limafund í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar seinnapartin týsdagin.

Ikki færri enn yvir 200 sjúkrarøktarfrøðingar vóru møttir á fundinum tað gjørdi hetta til ein hin fjølmentasta limafundin í felagnum í langa tíð.

Eitt endamál við fundinum var at viðgerða aktuellu støðuna á føðideildini.

– Tað var ongin ivi um, at nevndin í Felagnum Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar fekk fulla undirtøku síni sjónarmið í sambandi við ætlanin er at umleggja føðideildina, sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna í felagnum.

Sostatt tóku limir okkara fult undir við, at tað kann ikki góðtakast, at ein ljósmóður verður leiðari fyri sjúkrarøktini á føðideildini og tað kann heldur ikki góðtakast, at ljósmøður yvirtaka sjúkrarøktina á føðideildini, sigur Jana H. Dalsgaard.